# ÚKRAHÚSIÐ DAVENDAST




*Tað er ikki vist, at seinasta orðið er sagt um støðuna á Landssjúkrahúsinum eftir at Allan Skaalum, stjóri,varð sagdur úr starvi. Løgtingslimir halda, at hendan gongdin kann ikki halda fram og at Løgtingið nú má taka eina stóra og viðkvæma avgerð, nevniliga um, hvørjar viðgerðir, føroyska heilsuverkið skal bjóða og hvørjar viðgerðir, vit ikki skulu hava*

Hann heldur, at tað at alt ov kostnaðarmikið og stirvi at hava eina trýstreingjaða leiðslu ovast uppi við einum stjóra, einum læknastjóra og einum sjúkrarøktarfrøðistjóra.

- Harafturat kemur so ein menningarstjóri, so í veruleikanum er fýra fólk í leiðsluni og tað er heilt óhugnaliga dýrt.

Tí heldur hann, at nú Allan Skaalum er farin frá sum stjóri, eigur landsstýrismaðurin ikki at seta ein nýggjan stjóra fyribils.

Hinvegin heldur hann, at hendan næsta tíðin skal brúkast til at endurskoða leiðslubygnaðin, soleiðis at tað verður ein einsamallur stjóri á øllum Landssjúkrahúsinum.

- Veruleikin er, at øll hesi leiðslufólkini brúka alt ov nógva tíð til at finna semjur innanhýsis um tað virksemi, sum skal vera og um tiltøk, ið skulu setast í verk.

- Tað veit eg frá míni egnu tíð sum landsstýrismaður í heilsumálum, leggur hann afturat.

Tað tók nógv ár og kostaði nógv stríð at semjast um tann trýstreingjaða leiðslubygnaðin, sum nú er. Hvussu kanst tú vænta, at tað fer at bera til at finna semju fara aftur til tann gamla bygnaðin við einum einsamøllum stjóra?

Ja, tað veit eg, men tað er ov kostnaðarmikið. Tað einasta rætta er at hava ein stjóra, sum síðani kann søkja sær ráðgeving frá læknum og sjúkrarøktarfrøðingum, tá ið serlig mál stinga seg upp teimum viðvíkjandi.

Bill Justinussen ivast eisini í, hvussu nógv sjúkrarøktarfrøðingar fata røktarfakliga stjóran sum teirra umboð í leiðsluni, tí hann er ein samansjóðaður partur í leiðsluni.

Bill Justinussen leggur afturat, at tekur landsstýrismaðurin ongi stig í málinum, er tað ógvuliga sannlíkt at hann sjálvur fer at leggja uppskot fyri Løgtingið um at broyta leiðslubygnaðin á Landssjúkrahúsinum.

*aki@sosialurin.fo*

## Kundu sent rokningina til kommunurnar

Tað er ikki bara heilivágur, sum er orsøkin til at Landssjúkrahúsið aftur í ár kom í fíggjarligt óføri.

Tað staðfestir Vár í Gong, forkvinna í Felagnum Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar.

Tá ið orsøkirnar til støðuna á Landssjúkrahúsinum skulu greinast, hevur tað bara verðið víst á, at einasta orsøkin er, at tað er heilivágurin, sum er dýrkaður so nógv.

- Men øll tykjast at hava gloymt, at tað eisini kostar Landssjúkrahúsinum fleiri milliónir um árið at hava sjúklingar liggjandi, sum annars eru liðugt viðgjørdur og av røttum áttu at verðið útskrivaðir.

- Vit hava fingið upplýst, at talan er um einar 4-5 milliónir, sum hesi fólkini kosta Landssjúkrahúsinum.

Harafturat taka tey seingjarpláss frá sjúklingum, sum hava viðgerð fyri neyðini.

- Men hesi fólkini mugu verða liggjandi á Landssjúkrahúsinum, tí ongi pláss eru fyri teimum á røktarheimum.

**Rósa eigur sín part**

Vár í Gong sigur, at í Danmark, har kommunurnar hava ábyrgdina av eldrarøktini, verða rokningarnar fyri slík fólk send kommununum, tí tað eru tær, sum hava forsømt sína skyldu at útvega teimum røktarheimspláss.

Men í Føroyum er eldraøkið ikki lagt undir kommunurnar, so hendan møguleikan hevur Landssjúkrahúsið ikki.

Men undir øllum umstøðum heldur hon, at almannaráðið eigur at taka sín part av ábyrgdini fyri hesi fólkini, tí tá ið tey eru liðugt viðgjørd, hoyra tey ikki longur undir Landssjúkrahúsinum, men undir almannaverkinum.

Hinvegin heldur Vár í Gong eisini, at sjálvt um røktarheimspláss verða bygd kring landið, er tað harmiligt, at ætlanin í sama viðfangi er at niðurleggja onnur røktarheimspláss.

## Vil vita hvat vit fáa fyri pengarnar

**DÝRKANDI MILLUMLIÐ Nú vil Bill Justinussen hava at vita, hvat vit hava fingið fyri pengarnar, sum tað hevur kostað at seta ein menningarstjóra á Landssjúkrahúsinum**

Áki Bertholdsen

- Eftir mínum tykki er tað onki annað enn eitt dýrkandi millumlið at hava ein menningarstjóra á Landssjúkrahúsinum.

Tað heldur Bill Justinussen, løgtingsmaður fyri Miðflokkin.

Hann fer nú at seta landsstýrismanninum í heilsumálum, Aksel V. Johannesen, ein fyrispurning um, hvat vit hava fingið burtur úr, at Landssjúkrahúsið eini tíð síðani setti ein menningarstjóra.

Sjálvur heldur hann, at í veruleikanum er menningarstjórin einki annað enn eitt dýrkandi millumlið.

- Hetta er ein óneyðug útreiðsla og serliga nú tað er avmarkað við pengum, er tað burturvið, at brúka pengar upp á ein menningarstjóra.

Hann heldur eisini, at tað er lítil nytta í einum slíkum, tí ein skurðviðgerð kostar tað, hon kostar og tað er onki, ein menningarstjóri kann gera við tað.

Tí fer hann nú at spyrja landsstýrismannin í heilsumálum um nyttan av menningarstjóranum hevur staðið mát við útreiðslurnar.

*aki@sosialurin.fo*